# FIRST LEGO League í fólkaskúlanum

Undirvísingarstýrið, Nám og FIRST LEGO League Føroyar ( Fll-Føroyar) samstarva um at skipa fyri tvørfakligu FIRST LEGO League kappingini í Føroyum fyri skúlabørnum upp til 16 ár.

## §1. Endamál

FIRST LEGO League kappingin virkar fyri at kveikja áhugan hjá skúlanæmingum fyri tøkni, vísindi, nýskapan og íverksetan við at geva føroyskum næmingum altjóða pallin FIRST LEGO League, har tey í verki kunnu styrkja førleikar sínar í programmering, tøkni og gransking, umframt menna sosialar førleikar við at íverkseta nýskapandi hugskot í egnum nærumhvørvi.

## §2 Innihald

FIRST LEGO League Føroyar (hereftir nevnt FLL Føroyar) skipar fyri FIRST LEGO League kappingini.

FLL Føroyar samstarvar við føroyska skúlaverkið, og umframt at ráðgeva og stuðla lærarum við skúlaflokkum at luttaka í kappingini, skipar FLL Føroyar eisini fyri skeiðum fyri lærarum í FIRST LEGO League.

FLL Føroyar røkir samstarvið við norðurlendsku/donsku kappingarleiðsluna um fyrireiking og avgreiðslu av árligu kappingini í Føroyum, luttøku í norðurlendsku kappingarfinaluni, umframt luttøku í altjóða tiltøkum, tá møguleikar vísa seg.

## §3 Verkætlanin

Verkætlanin verður framd í tíðarskeiðum alt árið og fevnir um hesi átøk:

**Føroyska FIRST LEGO League kappingin:** FLL Føroyar leggur 8 vikur longu kappingina til rættis eftir altjóða leisti, sum allar FIRST LEGO League kappingarnar í eini 110 londum brúka.

Á hvørjum ári varpar kappingin ljós á nýggjar viðkomandi og hugtakandi samfelagsspurningar, sum luttakararnir læra um í verki, samstundis sum teir byggja og programmera ein lego-robott til at loysa ársins avbjóðingar.

Fyrireikingin til kappingina byrjar í februar-mars við skúlavitjanum og kunningarátøkum til tey, sum ætla at melda seg til FIRST LEGO League kappingina.

Í august/september fáa tilmeldaðu liðini ársins legoútgerð og liðblusur, so øll eru klár til miðjan september, tá kappingin byrjar við, at ársins evni og avbjóðing verða almannakunngjørd. Skipað verður fyri serligari kunning til vegleiðararnar.

Næstu 8 vikurnar til kappingardagin fyrst í november arbeiða liðini við ítøkiligu uppgávunum, har tey byggja og programmera ein legorobott, mentur at loysa ásettar uppgávur á einum avbjóðandi legobana, samstundis sum tey seta seg inn í ársins evni, savna inn vitan við at tosa við fólk, velja ein trupulleika, sum tey lýsa og finna uppskot at loysa á nýskapandi hátt og íverkseta í nærumhvørvinum. Kappingin endar fyrst í november við stóru føroysku FIRST LEGO League kappingini. FLL-Føroyar samskipar lið av uttanhýsis dómarum úr føroyska samfelagnum, sum eru við til seta hátíðarligan og rættvísan dám á stóra kappingardagin.

Vinnandi liðið fer víðari til norðurlendsku kappingarfinaluna fyrst í desember.

**Tilmelding til FIRST LEGO League kappingina**: FLL Føroyar stuðlar og vegleiðir skúlum og lærarum, sum lata skúlaflokkar luttaka í FIRST LEGO League kappingini við teim møguleikum, sum hetta gevur fyri tvørfakliga undirvísing og fjøltáttaða menning av sosialum førleikum. Afturat hesum bjóðar FLL Føroyar øllum liðum uttanfyri skúlagátt vælkomnum til kappingina, har liðluttakarar eru millum 10 og 16 ár.

**Undirvísingarfilmar og annað undirvísingartilfar:** FLL-Føroyar framleiðir filmar á føroyskum til luttakararnar, sum á léttan hátt lýsa uppgávur og møguleikar hjá liðunum. FLL-Føroyar framleiðir eisini annað tilfar á føroyskum til liðini og vegleiðarar teirra.

**Læraraskeið:** FLL Føroyar skipar fyri læraraskeiði, har skúlar og lærarar menna møguleikar at fáa sum mest burturúr virkseminum, sum FIRST LEGO League kappingin leggur upp til. Hetta fevnir um alt frá programmering av legorobottum til, hvussu tvørfakliga virksemið kann flættast inn í tímatalvuni við innsavning av vitan og gransking av ársins evni, at arbeiða við nýskapandi hugskotum til kreativar loysnir og íverkseting av hesum loysnum. FIRST LEGO League leggur dent á at styrkja sosiala samstarvið í flokkinum og samstarvið við foreldur við støði í virðisgrundarlagnum hjá FIRST LEGO League.

**Vegleiðing:** FLL-Føroyar stuðlar øllum vegleiðarum og útvegar m.a. vegleiðarafilmar, har ítøkiligu uppgávurnar verða lýstar.

**Norðurlendsk kappingarleiðsla:** FLL Føroyar leggur kappingina til rættis eftir altjóða leisti, sum allar FIRST LEGO League kappingarnar í eini 110 londum brúka. Fyri at tryggja hetta røkir FLL Føroyar samstarvið við danska/norðurlendska felagsskapin, sum á hvørjum ári fyrireikar og samskipar norðurlendska tilfarið til altjóða kappingina. Hetta fevnir m.a. um samstarv um ársins kappingaruppgávu, føroyskur samandráttur, legobani við legoinstallatiónum, kappingarblusur, samskiftispallar, vegleiðingar og stóru uppfylgjandi FIRST LEGO League finaluna í desember fyri øllum vinnandi liðum. Kappingarleiðarar úr øllum økinum koma saman í mars fyri at leggja árið til rættis og aftur í august fyri at gjøgnumganga og samskipa ítøkiligu 8 viku kappingaruppgávuna,

sum byrjar mitt í september. Stórur partur av FIRST LEGO League kappingarleiðarunum hittast at enda á finalukappingardegnum í desember.

**Finalan og aðrar kappingar uttanlands:** FLL Føroyar samskipar luttøkuna hjá føroysku meistarunum, so tey kunnu fara uttanlands til finalukappingina og kappast við vinnarar frá øðrum økjum. FLL Føroyar samskipar eisini, tá føroysk lið eru boðin við til onnur FIRST LEGO League tiltøk uttanlands.

**§ 4. Eftirmeting og ráðlegging**

Fundur, har undanfarna ár verður eftirmett og roknskapurin gjøgnumgingin, verður millum Undirvísingarstýrið, Nám og FLL-Føroyar í seinasta lagi 30. mars aftaná kappingarárið. Á fundinum verður eisini greitt frá, hvussu komandi ár verður skipað. Eftirmetingin og frágreiðing verður latin Barna- og útbúgvingarmálaráðnum.

**§ 5. Fígging**

Undirvísingarstýrið rindar FLL Føroyum 50.000 kr. árliga í stuðli til at seta í verk FIRST LEGO League verkætlanina, sum er lýst í § 2.

Nám rindar somuleiðis FLL Føroyum árligan stuðul á virði 50.000 kr. Um Nám veitir FLL Føroyum tænastur s.s skeiðsvirksemi og tilfar verður hetta mótroknað í stuðlinum. Stuðulin verður veittur til at seta í verk FIRST LEGO League verkætlanina, sum er lýst í § 2.

Stuðulin verður veittur sambært ásetingunum um m.a. fíggjarætlan, roknskap og grannskoðan í kunngerð um lógarbundna játtan og stuðulsjáttan.

**§ 6. Sáttmálin**

Sáttmálin verður endurskoðaður triðja hvørt ár, ella tá ið annar samstarvsparturin setur fram ynski um hetta.

Samstarvspartarnir kunnu siga avtaluna upp við 3 mánaða freist til 1. mars á hvørjum ári.

Peningurin verður útgoldin 1. mars á hvørjum ári. Grundarlagið fyri útgjaldinum er fíggjarætlan fyri inniverandi ár, sum verður send Undirvísingarstýrinum.

Tórshavn, tann 2. september 2024

Vegna

Undirvísingarstýrið

Hjalmar Hansen

Stjóri

Nám

Eyðun Gaard

Stjóri

Barna- og útbúgvingarmálaráðið

Djóni Nolsøe Joensen

Landsstýrismaður

FIRST LEGO League Føroyar

Jákup Heinesen

Verkætlanarleiðari